

Dagny Joensen, blaðkvinna

sjónarmið



Børnini blivin offur fyri hægstbjóðandi

Tað er gamalt at sláa tunnu og at ganga grýlu á fastalávint — soleiðis hevur altið verið, men nú er ivasamt, um hesin siðurin ikki fer at detta burtur í framtíðini. Føstulávint plagdi at vera fyri børnini, sum stákaðust dúgliga við at gera sær gekkaskortar og grýluklæði. Um dagin varð farið at sláa tunnur, og seinni, tá tað varð myrkt, fór allur barnaflokkurin á garðinum inn at vitja í grannalagnum, sum skuldi gita, hvør ávísa grýlan í veruleikanum var. Tá galt um at fjala seg væl aftanfyri grýluklæðini, og spennandi var at vita, hvussu leingi grýlan kundi halda sær, fyrr enn láturin fekk yvirhond og viðkomandi ikki kundi dylja rætta navn sitt.

Tey vaksnu spældu væl við, og søgdu seg ikki vita hvør grýlan var, hóast tað kanska ikki var so torført at gita seg fram til, men hetta bert fyri at gera tað so skemtiligt sum gjørligt.

Tá grýlan varð kend aftur, fekk hon okkurt góðgæti ella eitt oyra. Tað er ikki langt síðani at »vinningurin« var ein sukurmoli, eitt 10-oyra ella nakrar rosinur, men tað var í teirri tíðini ikki tað mest umráðandi. — Tað at ganga saman í stórum bólkum, hevði stóran stuttleika við sær, alt eftir hvat børnini sjálvi dugdi at fáa burturúr. Hartil kom, at børnini føstulávintskvøld sluppu at vera leingi úti, og bert tað hevði veitsludámin við sær.

Nútímans grýlur hava tað ikki so stuttligt, men tey vaksnu hava heldur ikki lært børnini at stuttleika sær, so sum foreldrini áður lærdu í sínari tíð.

Hvat er tað vit hava lært okkara børn, og hvørjir eru stuðlarnir?

Í Havn er tað vanligt at halda føstulávintshald í Ítróttarhøllini. Skúlabørnini hava frí henda dagin og tá plagar onkur vælgerðarstovnur at standa fyri tiltakinum. Tað er allan heiður og æru vert, at fólk ókeypis stuðla vælgerðararbeiði, men hví skal tað altið ganga útyvir børn okkara? Mær vitandi eru foreldur ongantíð boðin í veitslu, har tey bert kunnu reika millum nakrar gjørdar búðir, har ymist stakkalastás er til keyps fyri dýrgoldnan pening. Tað børnini kunnu keypa verður kortini blakað burtur á heimvegnum. Tað er av avgerandi týdningi fyri børn okkara, at tey læra at stuðla tann, sum hevur hjálp fyri neyðini, tí tað gevur teimum ábyrgd at vita, at ikki øll fólk hava somu sømdir. Kortini vil eg halda, at tað júst eru tey børnini, sum fara í Ítróttarhøllina føstulávintsmánadag, sum eru við sviðið soð! Mær var fyri henda dagin, at hoyra eina samrøðu millum tveir hálvvaksnar dreingir, har annar »bert« hevði 25 krónur at stuttleika sær fyri í høllini, meðan hin hevði 100 krónur. Tað stóðst ein tvídráttur millum vinmenninar, tí so stórur munur var á peningamongdini. Hann, sum bert hevði 25 krónur, helt tað vera bíligari at fara til keypmannin at keypa góðgæti, tí har var helst bíligari enn í høllini. Hin vildi niðan í høllina, har hann skjótast kundi sleppa sær av við tær 100 krónurnar. Børnini vistu sjálvandi, at tað at fara til føstulávintshald í høllini, bert var at brúka pening. Hetta gav einum nakað at hugsa um.

Hvat er tað vit gera við børn okkara? Læra vit tey ikki júst, at tað ikki ber til at stuttleika sær, um ein ikki hevur nóg mikið av peningi við?

— Hugsanin um føstulávint í gomlum døgum kom soleiðis fram fyri ein aftur. Tá kendu vit kanska ikki so nógv til vælgerðararbeiði — annað enn at binda til basar ella at láta nøkur oyru til Ungarnshjálpina, men tað forðaði kortini ikki fyri, at vit kundu stuttleika okkum, um so skuldi vera.

Tíðirnar broytast, tað hava tær longu lært okkum vaksnu ein hóp um seinastu 15—20 árini. Vit vita eisini, at stóra peningamongdin millum fólk ikki fer at verða verandi, men hví læra vit ikki børnini um tað sum er væntandi? Tað sýnist so hjartaleyst at hugsa um, hvat okkara børn skulu geva viðari til komandi ættarliðið, tí tá vit hugsa okkum um, so hava vit í jagstranini eftir peningaligum ríkidømi, fullkomiliga slept núverandi uppvaksandi ættarliði upp á fjall, har tey eru býti fyri tað hægstbjóðandi. Hvør, ið hevur skuldina av hesum, skal ikki verða umrøtt her, tá tað neyvan heldur er nakað beinleiðis prógv fyri, hví so er.

Sum sagt skulu tey, ið fyrireika slík tiltøk, hava tøkk fyri, at tey lata ókeypis arbeiðsmegi til góðgerðarendamál, men er tað neyðugt, at tað skal gerast til eitt handilsvirki, ið eingin sum letur pengar til (børnini) hava stuttleika ella gagn av?

Tað eru, sum áður sagt, bert skúlabørnini, sum hava frí føstulávintsmánadag, og soleiðis hava aðrir stovnar ikki afturlatið — tað vil siga, kunnu t.d. lærarar ikki verða forðaðir í at vera við til at skipa fyri hesum haldi.

Eg vildi tí fegin vita, um tað ikki er gjørligt hjá skúlastarvsfólki at gera okkurt munagott fyri skúlabørnini. Ítróttarhøllin er til taks, og teir, ið stjórna fyri góðgerðararbeiði, hava higartil arbeitt ókeypis. — Vælsignað veri tykkum, stuðlið okkara børnum eins og tit stuðla vælgerðarstovnunum. — Tað er júst tað uppvaksandi ættarliðið, sum skal taka yvir eftir okkum — men hvørjar fyrimyndir geva vit teimum, tá tey reika aftur og fram uppi í Ítróttarhøllini, har einasta samtaluevnið er... »Hvussu nógvar pengar hevur tú við...?«

Dagny Joensen

Í jagstranini eftir peningaligum ríkidømi hava vit slept uppvaksandi ættarliðnum upp á fjall....